Grefligt kjaftaslit um vikuskiftið

Nú dagarnir styttast til Føroya einasti punkbólkur »200« geva fløgu út, verður høvið at hoyra teir spæla (og brúka kjaft) live í vikuskiftinum. Og tað verður ikki við mýkindum tá 200 fara á pallin. M.a. verður nógv umrøddi og víðagitni pappmasje-fokkjú-fingurin, sum er sveipaður í silvur og gyrdur við eldfroysandi físum at síggja.

Nú Fríggjakvøldið Kl. 22.00 verður konsert og rumbul í Meiarínum í Havn við 200 og Flux.

Leygarkvøldið Kl 20.30 stendur losjan í Gøtu fyri skotum. Tá fara Clickhaze, sum ikki hava verið á palli í Føroyum síðani seint í summar, at leggja fyri. Okkurt nýtt lag verður eisini at hoyra frá Clickhaze.

Leygarkvøldið, sum konsertin er, er eisini ein serligur dagur í aðrar mátar. 17 nov. verða nevniliga 35 ár síðani komponisturin/-sangarin/guitaristurin Jeff Buckley varð føddur. Tíverri druknaði Jeff Buckley í 1997 einans 30 ára gamal. Í sambandi við føðingardag hansara verða nøkur av løgum hansara framførd, umframt at fløgur, filmar og DVD´ar við Jeff Buckley vera at fáa til keyps í losjuni.

Fløgan hjá 200 kemur ikki út fyrr enn mánadagin 19. november, men hjá teimum ótolnu eru tó ráð fyri hond: Á báðum konsertunum verður møguligt at keypa fløgur, plakatir og postkort við 200.

Heðin Kambsdal í Ribarhús

Tíðindaskriv

Hendan mánaðan sýnir Heðin Kambsdal fram yvir 20 málningar í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði.

Tann óútrokniliga, karga og gávumilda náttúran í øllum sínum veldi, er ein íblástrarkelda, ið er ring at koma uttanum, tá tú býrt í Føroyum og hevur hana beint uttanfyri vindeyga. Tú livir í og av henni, og ert eisini ein partur av henni.

Á framsýningini eru eisini nakrar meira manslýsingar.

Heðin er gamal í garði og hevur málað í mong ár. Sum óviti teknaði hann nógv við blýanti, kriti og oljukriti sum so mangur annar, og longu sum unglingi fór hann undir at royna seg við penslinum og oljuni.

Heðin Kambsdal hevur millum annað verið við á nógvum Varmakelduframsýningum, Ólavsøkuframsýningum, várframsýningum og Lionsframsýningum. Í Smiðjuni hevur hann eisini verið, og hann hevur eisini havt framsýningar í Lemvig, Herning, Ålborg, Hjørring og Fredrikshavn.

Tríggjar nýggjar bøkur

Tíðindaskriv

Bókadeild Føroya Læraratelags hevur givið út tríggjar nýggjar bøkur. Tær eru smábarnabókin »Banka uppá« eftir Annu-Claru Tidholm, mynda- og spælibókin »Á garðinum hjá Malju« eftir Lucy Cousins og barnabókina »Gylta svørðið« eftir Maj Bylock. Allar tríggjar bøkurnar eru prentaðar hjá Hestprent, og harumframt hevur Hestprent eisini umbrotið bókina »Gylta svørðið«.

Banka uppá er ein stuttlig og mennandi smábarnabók í føgrum litum til foreldur og tey minstu at hugna sær við. Í bókin eru fleiri hurðar í ymsum litum. Ætlanin er so, at børnini skulu banka uppá og vita, hvat goymir seg aftanfyri hurðarnar. Banka uppá er komin út í næstan øllum londum á okkara leiðum, og hevur rithøvundurin Anna-Clara Tidholm vunnið nógvar virðislønir fyri hesa bók og aðrar bøkur av sama slagi. Niels Jákup Thomsen hevur týtt bókina til føroyskt. Bókin er 28 blaðsíður í litum og kostar 49 krónur.

Á garðinum hjá Malju er fjórða bókin um Malju í ár. Tá tú letur bókina upp, springur garðurin hjá Malju uppúr, og so er bara at fáa sær pappírsdukkuna av Malju og øllum vinum hennara, trakktorinum, kúnni, hestinum og mongum øðrum at spæla við. Í alt eru 26 smálutir. Tá ið ein er liðugur at spæla, er pláss fyri øllum smálutunum soleiðis, at tú kanst lata bókina aftur og seta hana á bókahillina. Við tað, at so nógvir smálutir eru, er bókin ikki hóskandi fyri børn, ið eru yngri enn trý ár. Bókin um Malju og bóndagarðin kostar 130 krónur.

Gylta svørðið er onnur bókin av trimum um Petite, sum í fyrstu bókini varð rænd úr Fraklandi og førd til Svoríkis sum trælur í víkingatíðini. Nú kalla tey hana Ása, og hon er so heppin at vera komin væl fyri hjá hjúnunum Steini og Bóal. Nú skal steinur týða gátuna hjá gylta svørðinum, og her fær hann óvæntaða hjálp frá Ásu. Men ása er í iva: Hon hatar víkingar, men samstundis verður hon drigin at Torfinni, jalssoninum. Havbláu eygu hansara víkja ikki frá henni. Ein spennandi, løtt lisin bók til børn og ung. Ásvør Djurhuus týddi bøkina úr svneskum. Gylta svørðið er 104 síður, heft og kostar 125 krónur.

NÁTT-BUSSURIN
kjt Bussir Christensen
Leygarkvøldið í
• Vetur.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetur. kl. 00.30
• Vetur.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vetur. kl. 04.30
(Keyt miðar um Kvívík og Kollafjarðar eftir avtalu)
Eivur keyrir bussin
keyrsut eftir avtalu
TLF. 424254
Bussarnir:
TLF. 288254

Mat-seðilin
Hósdagin 15. nov.: Saltkjøt
Fríggjadagin 16. nov.: Kotelettir
Leygardagin 17. nov.: Oksasteik
Mánadagin 19. nov.: Kjøtfrikadellur
Tysdagin 20. nov.: Karbonadur
Mikudagin 21. nov.: Karrygryta
***
Seinnaparts-TILBOD frá kl.14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari 25,00
Matstovan í Hoyvík

Café Natúr
Vit STONGJA
sunnudagin 18. november vegna umvæling.
Í ti sambandi verður ymiskt selt úr Caféini.
Hyggi framvið leygardagin 17. november um hetta hevur tin áhuga
Hvørdi kvøldur
CAFÉ NATÚR
TLF. 31 26 25

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 16. november
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
• Sjávskapping frá kl. 19.00
UNDIRHALD
Leygardagin 17. november
• Rærstikjøtsveitsian og undirhaldið við Hilmar Jan byrjar kl. 19.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
Fluffy Toys spæla

Fríggjakvøldið
Diskotek við Kristian
Leygarkvøldið
Diskotek við Martin
Happy hour
23.00 – 24.00
BAROK

Leygarkvøldið
23. november
Peter Belli & Øríjudek Musikferðsgving
kr. 125,-
Ávanganarmiðir fáast til kaups á Kaupmannafelagsins og í 3'urinum
Sólt hátt borð
kr. 175,-
Borðbilagging á tlf. 31 75 00
Hotel Tórshavn

Rærstikjøtsveitsla verður leygarkvøldið 24. november
Undirhald við Hilmar Jan
Bilagt borð á telefon 223000 ella 497460
Shanghai

AUTO
-Dag eftir nátt - skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234